gult8 cyan8 magenta8 svart8



## DAGSINS MEINING

# Hjartaliga vælkomin til Føroya, Kasparov

Talvmeistarin, talvkongurin, talvkeisarin, telvarin av øllum telvarum í heimssøguni, Garri Kasparov kemur í dag til Føroya eftir innbjóðing frá Talvsambandi Føroya. Hetta er ein stórhending, sum allir føroyingar – telvarar og ikki telvarar - eiga at geva gætur, ein stórhending, sum fer at geva tí annars virknu og blómandi talvítróttini her á landi ein rimmar íblástur sum seint verður gloymdur.

Sterkasti og mætasti telvari í heimssøguni skal verða so hjartaliga vælkomin at vitja pinkutjóðina Føroya. Føroyingar eru takksamir fyri, at hann valdi at taka av júst hesi innbjóðingini, nú gravgangur er eftir honum at vitja øll heimsins lond. Tað er heldur einki minni enn eitt bragd, at tað hevur eydnast Talvsambandinum og her ikki minst ótroyttiliga formanni tess at fáa Talvkongan Kasparov at leggja leiðina til oyggjar okkara úti í Atlantshavi. Og hesum eiga tey tøkk og rós uppiborið fyri.

Tað er ikki skeivt at samanbera slíka hending við, at Føroyar fingu vitjan av fótbóltssnillingum sum Pelé og Beckham ella stórmenni sum Mandela. Ein løgin samanbering vil onkur siga, men tá hugsað verður um ríku talvsøguna og hvussu nógva tíð eitt stórt tal av jarðarbúgvum uttan mun til landamørk, húðalit og átrúnað hava brúkt og brúka frammanfyri talvborðið, so er henda vitjan einki minni enn ein sensatión.

Føroyingar eru góðir við sítt land, og tí harmar tað okkum at hoyra útlendingar siga, at teir hava ongantíð hoyrt um hetta landið og fólkið her býr. Tí frøðir tað okkum, tá fótbóltslandsliðið á útlendskum leikvøllum letur umheimsins eygu upp fyri lítla oyggjalandinum í Atlantshavi. Júst tað sama hava talvlandslið okkara gjørt. Tað at sjálvur heimsmeistarin í talvi nú vitjar land okkara er eisini nakað, sum letur umheimsins eygu upp fyri Føroyum.

Vit ivast ikki eina løtu í, at henda vitjan verður við til at økja medvitanina í øðrum londum fyri Føroyum. Men allarfyrst fer hon at verða ein eggjan, ein íblástur , ja ein katalysatorur fyri tey mongu, sum hava alsk til hetta so ótrúliga fyribrigdið, sum talv er. Neyvan nakað spæl ella ítróttargrein hevur havt slíkar fastatøkur í fólki í allari í heimssøguni sum talv. Fyri ungdómsarbeiðið hjá eini ítrótt hevur tað so ómetaliga nógv at siga at kunna síggja “teir stóru og góðu” í heimligum umhvørvi. Tí er vitjan Kasparovs eins lívgevandi spíri fyri uppvaksandi ættarliðið av føroyskum telvarum eins væl fyri tilkomnar og rutineraðar telvarar. Men talv ella ikki, so er tað ein stórur heiður at fáa vitjan av hesum mæta telvara. Enn einaferð hjartaliga vælkomin, Kasparov. Vónandi fáa tygum nógvar góðar dagar her. Tøkk til tey mongu, sum hava stuðlað vitjanini.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Exit Tórbjørn Jacobsen

**Atli Hansen**
*Gøtu, á hvítusunnu 2001*



Fríggjadagin í farnu viku legði so aftur ein mentamálaráðharri frá sær. Á tíðindafundi beinleiðis varpaður í loftmiðlunum slapp Tórbjørn Jacobsen sjálvur at gera leikpallin og at sita fyri borðendanum og geva sína frágreiðing um, hví hann hevði valt at taka hetta stigið.

Og hansara einfalda frágreiðing var, at ljóskastarin nú sum heild varð settur so nógv á persónin Tórbjørn Jacobsen, at hann skuggaði fyri politikkinum og málunum og at hann sum persónur soleiðis var vorðin ein trupulleiki. Og tí var besta loysnin helst at flyta skuggan (trupulleikan). Spennandi at síggja, hvat fer at koma undan, tá ið hetta hendir.

Tórbjørn gav sum orsøk fyri sína uppsøgn, sum hann segði vera sína egnu avgerð, at kúlurnar í ov stórt mát vóru rættaðar móti høvdinum á Tórbjørn Jacobsen í staðin fyri málunum. Hetta kann komast av, at bert annað av hesum finst í veruleikanum – nevniliga Tórbjørn Jacobsen.

Og tí sleppur Tórbjørn ikki undan sum limur í einum flokki, ið bert hevur eitt herróp sum einasta punkt á skránni, at verða viðgjørdur saman við hinum persónunum, ið ganga undan í herferðini. Ein flokkur, sum ikki hevur annað á skránni enn at rópa eftir ábyrgd fyri egnum landi – nakað sum vit onnur halda okkum inna í verki hvønn dag – ein tílíkur flokkur má dømast eftir teimum oddafiskunum, sum føra hetta kravið fram. Føroyingar mugu taka støðu til, um teir tora at fylgja hesum mnum, sum undir heitinum »ábyrgd« vilja bumba okkara búskap aftur í fornøldina, taka týðandi ríkisborgararættindi frá okkum, kvetta ættar- og vinarbond og í tí heila tikið at ganga mótsettan veg, sum verðin rundan um okkum. Nationalromantikkur sum útgangsstøði fyri tosi um ábyrgd er ikki nakar góður hornasteinur undir republikkini.

Tí mugu føroyingar seta ljóskastaran á teir persónar, sum mynda Tjóðveldisflokkin.

Eg havi fyrr víst á, hvussu formaðurin og varaløgmaður hevur slongt um seg við sínari *trúgv* uppá, hvussu tað fer at ganga okkum, tá ið vit fáa »ábyrgd av egnum landi«. Tá fer alt at broytast av sær sjálvum, tí sovorðið hevur ein innbygdan dynamikk í sær, at um vit bert fáa republikkina, so dalar manna av himli.

Og nú sóu vit so aftur henda sama formann og varaløgmann fyri opnum skíggja aftan á nevnda tíðindafund fríggjadagin kunngera fyri øllum Føroya fólki, at hann hevði roynt at tosað landsstýrismannin í mentamálum frá at leggja frá sær, tí hann hevði avrikað so nógv og hevði so nógv gott á skránni.

Kanska vóru hetta bert krokudillutár frá formanninum fyri ikki at fáa ein trupulleika afturat, nevniliga tað at halda eitt lyfti yvir fyri einum fyrrverandi mentamálaráðharra um at lata hann sleppa fram at aftur, um hann varð reinsaður fyri ákærur ímóti hansara umsiting í sambandi við Sjónvarp Føroya. Og um hvítusunnuna hava vit so hoyrt, at heldur ikki hetta lyftið var hann førur fyri at halda.

Øssur Winthereig hevði sama viðkomandi spurning til landsstýrismannin sjálvan, um tað ikki var ein gøla hjá einum manni við so nógvum dygdum, sum hann sjálvur hevði víst á, at taka seg aftur. Hetta fekk landsstýrismannin at fetta sær á og smílast ikki sørt.

Men føroyingar hava longu eftir 10 mánaðum í sessinum dømt Tórbjørn Jacobsen rangstaddan fleiri ferðir. Og fólk, sum hava vitjað í mentamálaráðnum, vita at siga um eitt levind og gang og eina vantandi fólkaligheit, sum fær hampafólk at fara á dyr aftur. Og hóast hetta hevur formaðurin í Tjóðveldisflokkinum valt at verja sítt yndisbarn og vónað, at hann kann skinkla seg fram til valið uttan meira rok.

Tjóðveldisflokkurin hevur eisini leverað samgonguni ein fíggjarmálaráðharra, sum sær tað sum sína fremstu uppgávu at flensa føroyingar í skatti og síðani at seta seg tungt á kassan. At krevja so nógv inn, at okkara fíggjarlóg hevur eitt yvirskot upp á uml. 600 mió. kr. er ørkymlandi og ivi kann vera um, hvussu lógligt hetta er. Nakað av hesum peningi hevði ivaleyst ligið betur í skattaborgaralummunum.

Proportiónirnar koma rættiliga fram, tá ið okkara fíggjarmálaráðharri letur tað vera ein trupulleika, um hann skal lata 3, 6 ella kanska 7 mió. kr. fyri at fáa eina skúlalóg førda út í lívið. Einki verður tosað um hetta er tað, sum skal til fyri at fáa føroyska skúlan at virka.

Kanska er størsti trupulleikin hjá øllum hesum tjóðveldismentamálaráðharrunum, at teir ikki sjálvir sluppu at seta sítt navn undir eina skúlalóg, men at hetta varð gjørt av einum sambandsmanni, sum í búskaparliga truplum tíðum fekk væl meira á skafti á føroyska skúlaøkinum enn allir hansara eftirmenn tilsamans – við 600 mió. kr. *um árið* at taka av á fíggjarlógini.

Og hesin fíggjarmálaráðharrin, sum Tórbjørn má finna seg í at verða avmyndaður saman við, var í Útvarpi Føroya herfyri og skuldi afturvísa talandi tølum frá einum av okkara fremstu búskaparfrøðingum. Tað varð gjørt við argumentum sum: »langt úti«, »politiskt« og »at eitt rokniark tekur ímóti so mangum«. Jú, soleiðis var svarið frá okkara fíggjarmálaráðharra.

Tí mást tú, Tórbjørn, finna teg í at verða viðgjørdur saman við hesum persónum, sum saman við tær ganga á odda fyri einum flokki, sum bert hevur nevnda herróp um »ábyrgd fyri egnum landi« á skránni. Men tit eru persónarnir, sum royna at gera loysing og búskaparligan ørvitisskap til tað sama sum ábyrgd. Og her liggur tykkara trupulleiki. At sannføra føroyingar um hesa javnseting.

Samgongan sær ikki út til at hava trupulleikar av framferðini hjá fyrrverandi mentamálaráðharra. Løgmaður lýsir frá summarbústaðnum á Viðareiði, at Tórbjørn Jacobsen er ein litríkur persónur – kanska í so buldrasligur.

Spurningurin til veljaran tykist at gerast alt meira einfaldur sum tíðin líður: Er tað ráðiligt at lata hesar stinga okkara framtíð út?

Svarið er NEI. Tað er skilaleyst.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


gult9 cyan9 magenta9 svart9



## VIÐMERKINGAR

# Verkfall og samgongan

**Finnleif Guttesen**
*Tvøroyri*



Trýr nakar av álvara, at verandi samgongan ikki hevði lagt seg út í eitt verkfall?

Hvør kann trúgva og taka orðini hjá hesum politikarum fyri fult?

Í sosialinum 24. mai 2001, skrivar formaðurin í Tjóðveldisflokkinum vøkur orð um, at teir virða og virka fyri rættindinum hjá fagfeløgunum.

**Hvar er trúðvirði?**
Er tað nakar, sum hevur fylgt við í kjakinum um samráðingar hjá fagfeløgum tað sísta hálva árið, sum kann taka orðini hjá tjóðveldisformanninum í álvara?

Hvussu kanst tú trúgva hesum politikarum og samgongu, sum við Tjóðveldisflokkinum á odda yvirhøvir ikki virða tey vøkru orð teir siga um virðing og rættindir.

Teir sístu 4 mánaðir hevur samgongan við Tjóðveldisflokkinum á odda, skúgva bæði virðing og rættindir til síðis í Brimla og Teista málinum.

Undantakið um neyðstøðu í landinum hjá tjóðveldisformanninum, heldur ikki í Brimla og Teistamálinum og eru orðini um virðing fyri fagfeløgunum tí bert orðageipan.

**Seinasta útspæl frá Tjóðveldisflokkinum**
Hergeir Nielsen valdur á ting í Suðuroy, vil tryggja Suðuroy í einari komandi grundlóg ímóti verkfallið, tí hann skilir ikki hví Suðuroyggin altíð blívur harðast rakt av einum verkfalli.

At Hergeir Nielsen ikki skilir tað er væl skiljandi, men skulu suðuroyingar ikki hava loyvi til at fara í verkfall?

Ella er tað norðoyingarnir, sum ikki kunnu fara í verkfall, tí so blíva suðuroyingarnir harðast raktir?

Ella skulu allir suðuroyingar gerast til tænastumenn?

Ella er tað bert teir, sum sigla við,- binda,- lossa/lasta Smyril, sum ikki kunnu fara í verkfall?

Livst so spyrst.

# Jamm, huldutungmálmur og gásarholdsrokkur

UMMÆLI
*Eiler Hansen*

Hesi trý lýsingarorð siga hampuliga væl frá leygarkvøldinum 26. mei í Losjuni í Gøtu. GRÓT borðreiddi enn einaferð við tí, sum vit kenna tey fyri, góðskutónleik fyri hvørt oyra – eisini peningaliga. Bólkarnir á plakatini vóru Jesus Band, Krit og Marigold.

Umstøðurnar gjørdu tað tó so, at Jesus Band ikki var fullmannað, og tí var ein onnur loysn í hendi fyri tónleikararnar. Gittarleikarin í Jesus Band fekk aftrat sær sjálvum trummuleikararnar í ávíkavist Clickhaze og Marigold á trummu og bassi, og teir »jammaðu« eina løtu. Teir umbóru seg við, at teir ikki høvdu havt langa venjingartíð, men avrikið skammaðist ikki burtur. Talan var um »instrumentalan« tónleik, sum hevði sínar røtur í tungmálminum. Tveir av tónleikarunum hava eina fortíð í tí stuttlivda, men sera væl umtókta Bingo, og tónleikurin teir tríggir spældu minti ikki sørt um áðurnevnda. Allir tónleikararnir framførdu tónleik á høgum støði, tað var ikki sørt, at øri sviin Yngwie J. Malmsten og John Petrucci úr Dream Theater hava gjørt sína ávirkan galdandi hjá unga gittarleikaranum. Áhoyrararnir – man kanska serliga gittarstreingirnir – fingu ein ”bita” av Jimi Hendrix. Sera gott og navnleysi bólkurin – skulu vit siga – slóg navnið fast og vit gleða okkum at hoyra meiri frá teimum.

Næstir á palli vóru Krit, sum eru vorðnir eitt sindur kendir her á landi, við síni ørðvísi framferð á palli. Talan er um myrkan tónleik, sum tó vísir seg at vera sera inniligur og kensluborin. Sangarin skifti í fleiri songum brádliga frá illum gallrópi til Sangurin var sera melodiskur og hóskar sera væl til tónleikaslagið. Um vit skulu nevna útlendskar bólkar at líkna teir við, kundi teir t.d. verið Marilyn Manson, HIM. Tónleikurin bar bráð av góðum hugflogi og tað er hugaligt at sita og lurta, tá tónleikarar hava gjørt sær ómak at vera ørðvísi og at gera tað teir gera væl. Fleiri temposkift og væl vald akkordskiftir, sum eisini hóskaðu sera væl til skýmliga tónleikaslagið. Huldutungmálmur. Tónleikararnir gera nógv við ”showið”. Annar gittarleikarin var í síðum svørtum kappa, hevði málað seg hvítan í andlitinum og hin gittarleikarin hevði málað sær ein grábrúnligan skort á andlitið. Ikki sørt av punk-anda var yvir teir.

Síðani trinu Marigold á pallin. Besti háttur á lýsa tónleik teirra frá undirritaða sjónarmiði er, at tey spæla gásarholdsrokk. Tónleikararnir geva seg heilt og forsangarin hevur eina rødd, sum fáum er beskorið. Marigold megnaði ótrúliga væl at blanda eitt sindur av ”elektronika” inn í grungekenda rokk teirra. Í onkrum lagi var rútmumaskinan at rokna sum krydd og í øðrum var hon, heldur hinvegin, tann berandi bulurin og hini leikførini krydd. Um vit eisini her skulu nevna bólkar, so lesarin hevur eina hóming av ”stílinum” kunnu vit nevna Skunk Anansie og Portishead, bara fyri at nevna tveir. Eins og hinir bólkarnir hava tónleikararnir í Marigold gjørt tónleikin sjálvi og tað er fløvandi at hoyra, hvussu væl ungu tónleikararnir duga at seta saman ljóð, tónar og rútmu í eina heilstoypta heild. Sjálv framførslan hjá Marigold var heldur einki at kimsa at. Tónleikararnir liva væl við í tónleikinum og tú fært kensluna av, at teimum dámar sera væl at spæla tónleik.

Alt í alt eitt sera gott kvøld við hágóðsku tónleiki. Grót skipaði so fyri, at áhoyrararnir kundu keypa sær sodavatn, te, kaffi og kakubita, so at á ein hátt var hetta ein rokkkafe, um vit so kunnu siga.

Tónleikasamtakið Grót, sum var stovnað á heysti í 1998, er eitt sera virkið felag, ið javnan hevur tiltøk av ymsum slagi. Felagið er farið í eitt vist samstarv við Norðurlandahúsið, og ætlanin er, at onkur av gestunum á listastevnuni seinni í summar, gera sær eitt rend inn í Losjuna í Gøtu, sum í stóran mun er høvuðsstøðin hjá Grót.

Ólavsøkukonsertin nærkast og tað verður spennandi at vita um hesir framúr áhugaverdu og dugnaligu bólkar fáa innivist. Vit vóna tað.

Sosialurin
Lesið Sosialin – tað loysir seg

# Felags norðurlendsk útbúgvingarkrøv til zonuterapeutar

TÍÐINDASKRIV

Norðurlendski samstarvs-felagsskapurin NRN hevur nú samtykt minstukrøv til zonuterapiútbúgvingina og arbeiðir fyri felags útbúgvingar- og próvtøkukrøvum í øllum Norðurlondum.

Tíðindaskriv um samtykt á ársfundi hjá NRN, ”Nordic Reflexology Network”, við-tøka á fundi í Bergen 27 apríl 2001.

15 zonuterapeutar úr Danmark, Noregi, Svøríki og Føroyum hava, við útgangsstøði í skrivi frá danska skattamálaráðnum og danska Toll & Skatt, viðtikið eina røð av minstukrøvum fyri útbúgvingarstøðið hjá zonuterapeutum, sum virka í norðurlond-um.

Tað, ið gongur fram av donsku krøvunum, er, at “Told og Skattestyrelsen finder – efter at have spurgt Sunhedsstyrelsen – at zoneterapeuter, der har gennemgået følgende uddannelse kan anses for at udføre behandlinger, der hører under om-rådet anden egentlig sundhedspleje”, (en beslutning som medførte, at de danske zoneterapeuter med virkning fra 1. juli 1999 blev momsfrie!)

Donsku krøvini til útbúgvingina eru hesi:

- Anatomi/fysiologi – 200 lektioner
- Sygdomslære/farmakologi – 100 lektioner
- Zoneterapi/meridianlære/visuel diagnose – 255 lektioner
- Kost- og vitamin-/minerallære – 30 lektioner
- Biopati – 15 lektioner
- Psykologi – 50 lektioner
- Klinikvejledning/klientbehandling – 10 lektioner

Ialt 660 lektioner

Við donsku reglunum sum útgangsstøði varð fylgjandi minstakrav viðtikið til allar zonuterapiútbúgvingar í Norðanlondum:

- Anatomi/fysiologi – 200 lektioner
- Sygdomslære/ farmakologi – 100 lektioner
  (Eller/og har bestået eksamen i de to nævnte fag med pensum er svarer til sygeplejerskeniveau i det pågældende land)
- Zoneterapi/journalføring (ud fra den orientalske filosofi/journalføring) 255 lektioner
- Ernæringslære: kost, vitaminer og mineraler – 30 lektioner
- Orientering om andre behandlingsformer – 15 lektioner
- Psykologi & etik – 50 lektioner
- Kliniktjeneste/praktisk erfaring – 50 zoneterapibehandling er fordelt på 10 for eleven ukendte klienter
- Det anbefales, at eleverne inden afsluttet uddannelse har gennemgået kursus i førstehjælp
- Orientering um zoneterapiforskning (materialet er udarbejdet af REIN Recearch Group)

**Ialt 650 lektioner ekskl. praktik**
Omanfyri nevnda verður hereftir at meta sum avgjørt minstakrav, og leggjast skal til merkis, at fleiri útbúgvingarstøð í løtuni hava undirvísing í fleiri øðrum fakum, sum relatera til útbúgvingina. Minstakravið verður at meta sum grundstøðið, sum ar-beiðast skal víðari frá, og liggur sum grund undir komandi felags norðurlendskum pensumkrøvum og felags próvtøkukrøvum.

Soleiðis samtykt á fundi í Bergen 27 apríl 2001 av NFS, Norsk Forening for Sone-terapi, NNH, Norske Naturterapeuters Hovedorganisasjon, ZTF, Zoneterapiforbundet i Sverige, SFRF, Svenska Fotzonterapi-Reflexologiforbundet, og FDZ, Forenede Danske Zoneterapeuter. Oda Andreasen, sum eisini er limur í FDZ, umboðaði Føroyar.